## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, men hann minkar vindin um kvøldið. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, um kvøldið frískar hann vindin av landnyrðingi. Sólglottar, men eisini ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og regn ella ælingur av og á. Hitin millum 2 og 6 stig.

# Jóannes Nielsen norðurlendska viðurkenning

TIÐINDASKRIV

Norðurlendska Teaturuniónin letur 2. hvørt ár ta Norðurlendsku dramatikaraviðurkenningina... 



Norðurlendska Teaturuniónin letur 2. hvørt ár ta Norðurlendsku dramatikaraviðurkenningina uppá kr. 50.000,-.

Norðurlendska Teaturuniónin er felagsskapur av norðurlendskum fakligum samtøkum innan sjónleik. Leikarafelag Føroya fekk fullan limaskap í uniónini í 1996.

Norðurlendska Teaturuniónin skipar somuleiðis 2. hvørt ár fyri Norðurlendskari Sjónleikaráðstevnu.

Henda ráðstevnan verður í ár á fyrsta sinni í Føroyum í døgunum 7.–11. august. Tá verður eisini dramatikaraprísurin handaður.

Dramatikaraprísurin verður latin til leikverk, ið er frumsýnt innanfyri tey tvey seinastu árini. Dentur verður eisini lagdur á, at leikverkið er nýskrivað. Í ár var møguleiki, fyri fyrstu ferð, at instilla eitt føroyskt leikverk, *Eitur nakað land Week-end* eftir Jóanes Nielsen.

Á fundi í stýrinum fyri Norðurlendsku Teaturuniónina 24. mars 2002 í Havn varð leikurin *Eitur nakað land Week-end* eftir Jóanes Nielsen kosin vinnari av Norðurlendska Dramatikarprísinum 2002 við hesi grundgeving:

Leikurin ber brá av at gerast eitt nútíðar familjudrama, men gerst eitt spæl, ið fyri tað mesta fer fram á afturlatnum psykiatriskum stovni, og sýnir okkum høvuðspersónin Jóhónnu millum hinar sjúklingarnar á deildini.

Her eru gaman og álvari partar av styrki rithøvundans, soleiðis at ein skemtiligur og originalur palltekstur, ið ger okkum bilsin og letur sinnið upp, trínur fram.

Leikurin er flótandi og frítt skrivaður, við ógvuliga myndavøkrum og hjartanemandi einarøðum, ið sýna, at høvundurin er sera góður yrkjari við ansi fyri tí tragikomiska og við stórum mannatokka í sínum persónslýsingum.

Leikurin rúmar somuleiðis ein stóran bita av føroyskum sjálvsatfinningarsemi og lýsing av sjálvhatri.

Høvundurin ræðist heldur ikki fyri at koma við atfinningum móti hjálandaviðurskiftum.

Ein feril af innflytara- g flóttafólkatrupulleikum er eisini við í leikinum.

Men í miðdeplinum stendur Jóhannumyndin við sínum óforloysta kærleika.

Menniskjanslig, grípandi og skemtilig lýsing.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷13 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | 5 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 11 |
| Tromsø | – |
| Bergen | – |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 17 |
| Malta | – |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 24 |
| New York | 13 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 33 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 987 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani fer um Føroyar mikunáttina.




Hátrýstið yvir Atlantshavinum fer í landnyrðing og verður væntandi við Føroyar fríggjadagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/04 kl. 06⁰⁰– 09/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,0°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,7 mm – mált frá 08/04 kl. 06⁰⁰– 09/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 8,7 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T—SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212

### VESTFALLSKYRRINDI

4. apríl: Seinna kvarter
10. apríl: Mánin longst frá jørðini
12. apríl: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. apr | 06.14 | 18.32 | 05.14 | 17.32 | 05.29 | 17.47 | 08.14 | 20.32 | 09.14 | 21.32 | 04.29 | 16.47 | 03.29 | 15.47 | 06.29 | 18.47 | 07.29 | 19.47 | 05.59 | 18.17 | 07.14 | 19.32 |
| 11. apr | 06.49 | 19.07 | 05.49 | 18.07 | 06.04 | 18.22 | 08.49 | 21.07 | 09.49 | 22.07 | 05.04 | 17.22 | 04.04 | 16.22 | 07.04 | 19.22 | 08.04 | 20.22 | 06.34 | 18.52 | 07.49 | 20.07 |
| 12. apr | 07.23 | 19.43 | 06.23 | 18.43 | 06.38 | 18.58 | 09.23 | 21.43 | 10.23 | 22.43 | 05.38 | 17.58 | 04.38 | 16.58 | 07.38 | 19.58 | 08.38 | 20.58 | 07.08 | 19.28 | 08.23 | 20.43 |
| 13. apr | 08.00 | 20.18 | 07.00 | 19.18 | 07.15 | 19.33 | 10.00 | 22.18 | 11.00 | 23.18 | 06.15 | 18.33 | 05.15 | 17.33 | 08.15 | 20.33 | 09.15 | 21.33 | 07.45 | 20.03 | 09.00 | 21.18 |

5 707265 100036 >